# Mjølnir heldur fast

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Hóast ÍF fór avstað við fyrsta settinum, eydnaðist ikki at gera meira við Mjølnir, ið heldur jólafrí á øðrum plássi

Hilmar Jan Hansen

Eftir heimasigurin á ÍF í gjár, hevur Mjølnir nú vunnið fýra dystir á rað og sær veruliga út til at hava tað, sum skal til, skal liðið gera seg galdandi heilt har frammi. Og í løtuni líkist Mjølnir mest einari hóttan ímóti oddaliðnum, SÍ.

Í gjár tóktist tað annars frá byrjan, sum var ÍF ein stór hóttan ímóti Mjølnir. Tað eydnaðist ÍF at leggja gott servutrýst á beinanvegin, umframt at spælið hekk væl saman, og tá Mjølnir ikki fekk svarað nóg væl aftur, legði ÍF seg beinanvegin á odda við at vinna fyrsta sett.

Men hetta skakaði ikki klaksvíkskvinnur meira enn so, at tær beinanvegin í øðrum setti tóku sær um reiggj og fingu vent dystinum. Til tíðir koyrdi spælið sera væl hjá Mjølnir, sum vann tey trý næstu settini og dystin, og tí kann Mjølnir halda jólafrí á øðrum plássi í Eik-liguni hjá kvinnum.

ÍF hevur nú tapt tríggjar dystir á rað, og tað, sum herfyri sá so lovandi út eftir fýra sigrar á rað, peikar nú mest á eitt heldur svingandi ÍF-avrik, ið tó var betri í gjár, hóast úrslitið ikki var til vildar.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Tætt á Toftum

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Munurin á toppi og botni sást ikki serliga væl, tá Ternan tók ímóti SÍ

Hilmar Jan Hansen

Fyri nøkrum døgum síðani vitjaði SÍ á Toftum, og hóast talan var um topp og botn, ið møttust, sást tað ikki so væl aftur, tí longur tað leið út á dystin, tóktist munurin minni á liðunum.

Í triðja setti var um reppið, at Ternan veruliga kom inn í dystin, tá leiðslan var 17-12, men so kom SÍ afturíaftur og vann settið og dystin. Ikki óuppiborið, men heldur ikki serliga sannførandi.

Helst var hetta ikki tann besti dysturin hjá sørvágskvinnum, samstundis sum Ternan enn eina ferð vísti, at liðið er á rættari leið og ger framstig.




*Við sigrinum í Kollafirði leygardagin hildu tær í TB seg framvegis í nánd av teimum trimum liðunum frammanfyri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# TB fylgir við hinum

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Hóast TB ikki spældi upp til sítt besta, rakk tað tó væl og virðiliga til sigur á KÍF

Hilmar Jan Hansen

Framvegis liggur TB aftan fyri tey trý fremstu liðini, og leygardagin tóku tvørakvinnur enn eitt fet rætta vegin, tá tær í Kollafirði vunnu 3-1 á KÍF.

Hetta var eitt slag av hevnd, kann sigast, tí fyri hálvumøðrum mánaði síðani gjørdi KÍF bart og vann púra óvæntað á TB í Trongisvági.

Hesa ferð høvdu tær í TB sett sær fyri, at hetta ikki skuldi endurtaka seg, og tað eydnaðist eisini. Kortini, uttan at TB spældi upp til sítt besta, men tó hevði munin á KÍF ígjøgnum dystin.

Eftir at hava vunnið tey bæði fyrstu settini, kom tó slingur í valsin hjá TB. Nú raknaði KÍF veruliga við og fór at vinna bóltarnar, so tað gjørdist eitt rættiliga spennandi sett, har KÍF hevði settbólt fleiri ferðir og TB matsjbólt ta einu ferðina. KÍF tók settið 29-27.

Hetta var nakað, ið veruliga sá út til at kløkka TB, tí í fjórða setti gjørdist aftur munur á, og í løtum vísti TB munandi betri spæl enn í teimum undanfarnu settunum. Tað rakk til sett- og dystarsigur, og tí er TB framvegis við heilt har frammi.

KÍF hevur bara vunnið tveir av tilsamans níggju dystum, so har gongur tilveran fyri seg í hinum endanum á stigatalvuni. Men við einari blanding av ungum og royndum spælarum kann KÍF saktans taka onkrar sigrar aftrat hetta kappingarárið.

hilmarjan@sosialurin.fo